# Byggja skúlan út fyri 15 milliónir

**Kvívíkingar taka eitt ódnartak, nú teir skulu byggja skúlan tvær ferðir so stóran, sum hann er nú**

SKÚLABYGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Skúlin í Kvívík hevur vánaligar umstøður, men nú verður skúlin bygdur út fyri 15 milliónir. Útbyggingin verður liðug í 2005*

**Kvívík:** Kvívíkar kommuna fer nú undir eitt ódnartak.

Skúlin skal byggjast út og tað er ikki hissini útbygging, tí tá ið hann er liðugur, verður hann tvær ferðir so stórur, sum hann er nú.

Heini Holm, borgarstjóri, sigur, at útbyggingin kostar einar 15 milliónir.

Hetta er eitt stórt tak hjá kommununi og fer avstað við mestum allari fíggjarorkuni hjá kommununi tey næstu árini.

Borgarstjórin sigur, at ætlandi skal kommunan verða liðug at betala skúlan í 2006.

Ætlanin er at seta 400.000 krónur av um mánaðin til skúlan, hiðani og til 2006, men kortini sleppur kommunan ikki undan at taka eitt lítið lán, sum kanska kemur upp á seks milliónir, tá ið tað er stórt, ætlanin er at allur skúlin, við láni og øllumm skal vera goldin í 2006.

– Vit hava spent okkum ógvuliga hart fyri at fáa hetta so skjótt frá hondini, sum gjørligt, sigur borgarstjórin.

Annars er kommunan skuldarfrí, tí teir síðstu avdráttirnir vórðu goldnir í 1999.

### Tvær ferðir so stórur

Heini Holm sigur, at ætlanin er at byggja einar 1.000 fermetrar afturat upp í skúlan. Harumframt skal skúlin, sum er, byggjast um.

Tríggjar skúlastovur vera afturat, ein til alis- og evnafrøði køk og annað, umframt skrivstovu, lærarastovu, forhøll og wc. Samstundis skal gerast bókasavn og teldurúm, smíðstova og musikstova.

Arbeiðið byrjar nú um mánaðarskiftið og skúlin er liðugur tá ið børnini fara í skúla í 2005.

Heini Holm sigur, at skúlin hevur sera ringar umstøður. Avleiðingin er, at nógv ymiskt virksemi er blandað saman í somu hølum og flokkar noyðast at skifta høli fleiri ferðir um dagin, eisini fyrsti flokkur og tað er ógvuliga óheppið.

Annars er skúlin í Kvívík væl fyri, tí hann hevur bæði fimleikarahøll og svimjihyl.

Í Kvívík er skúlabarnatalið annars av tí lægsta beint nú. Tað eru 47 skúlabørn í kommununi.

Tá ið skúlabørnini vóru flest í tali, vóru tey næstan 70 børn í skúlanum, men tað vanliga hevur ligið um 50-60.

Men skúlabarnatalið fer at kvinka uppeftir aftur spakiliga, tí tað eru ung húski í kommununi.

Tað er eisini gravgangur eftir grundstykkjum í kommununi. Fyri einum góðum ári síðani seldi kommunan 15 grundstykki og tað tók bara ein dag at sleppa av við. Borgarstjórin sigur, at tað verður ikki í hesum valskeiðnum, at fleiri grundstykki verða frá kommununi, tí til 2006 er skúlin raðfestur fremst.

# Óvanligur fundur um heitt evni

**Mánakvøldið verður stórur almennur pallborðsfundur í Útvarpshøllini um føroyska arbeiðsmarknaðin, sum nógv rok hevur verið um seinastu tíðina**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Serliga drúgva verkfallið í vár hevur ført til drúgvt, og stundum ógvuliga hart kjak um viðurksifitini á arbeiðsmarknaðinum. Fundurin mánakvøldið kann verða eitt veruligt stig á leiðini at fáa partarnar at skilja hvønn annan betri og at nærkast hvørjum øðrum. Her standa verkfalsfólk og blokera Shell á Frælsinum*

Er tað í lagi, at fakfeløg fara í verkfall í heilum?

Skulu allir limirnir í fakfeløgunum sleppa at atkvøða um teir skulu í verkfall ella ikki?

Skulu vit hava arbeiðsrætt í Føroyum?

Ella er tað yvirhøvur neyðugt at gera nakað?

Hetta eru alt spurningar, sum hava staðið ógvuliga frammaliga í almenna kjakinum í Føroyum, serliga síðani drúgva verkfallið í vár.

Tað hevur víst seg at vera sera trupult at pilka við hesi viðurskiftini og mangan hevur kjakið verið heitt. Men tað tykist sum um at teir ymsu partarnir liggja í hvør sínari skotgrøv og leggja alla orku í at verja seg og síni og tí er trupult at fáa partarnir at tosa saman.

### Kortini á borðið

Nú ætlar javnaðarflokkurin at fáa kortini á borðið. Flokkurin ætlar at fáa greiði á, hvørja støðu, teir ymsu partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava og hvørja støðu politikararnir hava til hetta viðkomandi málið.

Tí skipar flokkurin fyri stórum almennum pallborðsfundi um arbeiðsmarknaðin í útvarpshøllini í Havn mánakvøldið klokkan 19.30.

Tað, sum fundurin skal royna at fáa greiði á er stutt og greitt:

Hvat kann gerast fyri at fáa betri lag á føroyska arbeiðsmarknaðinum? Ætlanin er, at tosa um, hvussu ósemjur ímillum partarnir skulu avgreiðast, bæði ósemjur í sjálvum sáttmálaskeiðnum og ósemjur undir sáttmálasamráðingum.

Ætlanin er eisini at tosa um, hvussu álit kann skapast ímillum partarnar á arbeiðsmarknaðinum og ímillum teir og politiska myndugleikan, fyri at fáa eitt støðið at menna ein framrættaðan arbeiðsmarknaðarpolitikk á

### Óvanligur fundur

Men hetta verður ikki ein vanligur pallborðsfundur.

Á hesum fundinum koma luttakararnir at sita við trý ymisk pallborð, sum fara at greiða frá og at seta hvørjum øðrum spurningar. Og at enda verður so eitt politiskt umfar, har politikararnir sleppa at siga sína hugsan, tí tað er í síðsta enda teir, sum koma at taka avgerðina.

Endamálið er at fáa tey ymsu sjónarmiðini fram í stuttum og greiðum grundgevingum, sigur Hans Pauli Strøm skrivari hjá javnaðarflokkinum

Hann sigur, at Helgi Jacobsen, útvarpsmaður fer at stýra fundinum við fastari hond, so tað verða ikki stundir til langar fyrilestrar.

- Vit skulu hava sjónarmið á borðið, stutt og greitt og tað verður ikki rúm fyri uttanumtosi.

Hann sigur, at á hesum fundinum fáa politikarar, partarnir á arbeiðsmarknaðinum og serfrøðingur eitt sjáldsamt høvi at sita andlit til andlit og tosa um viður

Ætlanin er eisini, at fundarfólki skal sleppa at seta teimum, sum manna pallborðini spurningar.

Pallborðini verða mannað soleiðis:

Pallborð 1: Partarnir á arbeiðsmarknaðinum:

- Ingeborg Vinther, Føroya Arbeiðarafelag
- Gunnleivur Dalsgarð, Starvsmannafelagið
- Bjørgfríð Ludvig, Vinnuhúsið
- Thomas Magnussen, Fíggjarmálaráðið

Pallborð 2: Serfrøðingar

- Eyðfinnur Jacobsen. løgfrøðingur
- Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur

Pallborð 3: Politikarar

- Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, fólkaflokkurin
- Hans Pauli Strøm, floksskrivari, javnaðarflokkurin
- Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, sambandsflokkurin
- Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, tjóðveldisflokkurin



Fíggjarætlanin hjá Tórshavnar kommunu:

# Størri rásarúm

**Fyribils fíggjarætlanin fyri 2004 hjá Tórshavnar kommunu hækkar ikki eins nógv, hon hevur gjørt undanfarin ár. Búskaparvøksturin er við at fána burtur, men Tórshavnar býráð kann fegnast um, at væl minni verður rindað í rentum og avdrátti komandi ár. Hetta gevur Tórshavnar Býráð størri rásarúm, tí nú eru 13 mio. krónur meir at arbeiða við.**

FÍGGJARÆTLAN HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Trøðini veksa ikki upp í himmalin, og vit hava ásannað, at framgongdin er minni, og uttan at ljóða sum ein dómadagsprofetur, so er tað ein sannroynd, at vøksturin er fánaður burtur, og tann veruleika mugu vit halda okkum til, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Á býráðsfundi hóskvøldið var fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu fyri 2004. Fíggjarætlanin er mett at javnviga við 445 mió. krónum. Sammett við fíggjarætlanina í fjør, hækkar hon bert sjey millíonum komandi ár. Hetta er væl minni enn seinastu árini, tá hon árliga er vaksin við góðum 30 og 40 millíonum krónum.

– Trøðini veksa ikki upp í himmalin, og vit hava ásannað, at framgongdin er minni, og uttan at ljóða sum ein dómadagsprofetur, so er tað ein sannroynd, at vøksturin er fánaður burtur, og tann veruleika mugu vit halda okkum til, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.

Hann leggur dent, á Tórshavnar kommuna rindaði stóran part av skuldini í fjør, og hetta merkist á fíggjarætlanini fyri komandi ár.

Jan Christiansen sigur, at kommunan rindar góðar 13 mio. krónur minni í rentum og avdrátti komandi ár, og leggur ein tær 13 mio. krónurnar afturat ætlaða vøkstrinum á sjey milliónum krónur, so svarar samlaði vøksturin á fíggjarætlanini fyri 2004 til góðar 20 mio. krónur sammett við 2003.

Skuldin hjá Tórshavnar kommunu er komin niður á góðar 60 milliónir krónur, og verða ognirnar hjá kommuni drignar frá, so er kommunan í tí støðu, at hon er skuldarfrí netto

### Barnaansingin fær minni

Sammett við fíggjarætlanina fyri 2003, fer barnaansingin í Tórshavnar kommunu at fáa góðar 400 milliónir minni komandi ár. Hetta kann tykjast løgi, tá havt verður í huga, at væntandi økja lønarútreiðslurnar á barnaansingini eftir lønarsamráðingarnar ínæstum. Spurdur, um Tórshavnar kommuna hevur lagt uppfyri eini lønarhækkan, svarar Jan Christiansen, at tað hevur býráðið tikið hædd fyri.

– Vit yvirbudgetteraðu í fjør, og hyggur tú at fíggjarætlanini sammett við roknskapin, so sært tú, at vit settu ov nógv av. Hetta var ein skeivleiki frá okkara síðu, og nú skuldu tølini passa betri, sigur Jan Christiansen.

### Einki nýtt

Elin Lindenskov, ið umboðar Javnaðarflokkin í andstøðuni í Tórshavnar býráð sigur, at framvegis er ov stutt fráliðið við viðgerðini av fíggjarætlanini fyri 2004, so tað er torført at gera nakra endaliga meting av henni .

– Tað er bara 1.viðgerð, ið farin afturum, og framvegis er íløguætlanirnar ikki framlagdar, og tað er eitt øki, ið vit eru mest spent um, sigur Elin Lindenskov.

Elin Lindenskov vísir á, at rentu- og avdráttar byrðan er minni í ár, tí kommunan hevur rindað nógva skuld seinastu árini, men henni vantar eina ætlan frá samgonguni í Tórshavnar býráð, hvat hesin peningur skal nýtast til.

– Tórshavnar býráð hevur fingið størri rásarúm, tí nógv skuld er rindað, men sum heild haldi eg, at tað manglar ein ætlan, hvat Tórshavnar býrað vil við peninginum .

Spurd, um andstøðan í Tórshavnar Býráð ætlar at leggja nakað uppskot fram til aðru viðgerð av fíggjarætlanini, svarar Elin, at andstøðan i løtuni arbeiðir við at hækka barnafrádráttin, tí eftir øllum at døma skulu foreldur í Tórshavnar kommu í framtíðini gjalda meir í ansingargjaldi.

Tað hevur verið havt á lofti, at lønarhækkanin hjá pedagogunum fer at hava við sær, at foreldrini gjalda meir fyri at fáa børnini ansað. Sum eitt afturgjald, ætlar andstøðan at leggja uppskot um at hækka barnafrádráttin.

Á Platform leygarkvøldið:

# Nostalgi fyri allar pengarnar

**Jákup Magnussen, Heðin Arge, Regin Johansen og Finn Jensen, sum allir vóru millum fremstu plátuvendarar í 70- og 80 árunum, fara at venda plátum á Platform leygarkvøldið.**

GRAND OLD DJ`S Á PLATFORM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin*

Leygarkvøldið skipar dansistaðið Platform fyri einum rættiliga forvitnisligum kvøldi. Havgrímur Johannessen hevur savnað fýra av teimum fremstu plátuvendarunum frá 70- og 80 árunum at venda plátum á Platform leygarkvøldið.

Regin Johansen, Jákup Magnussen, Finn Jensen og Heðin Arge vóru gjøgnum 70 árini og kanska serliga 80 árini nógv umbidnir plátuvendarar kring alt landið. Teir fýra hava áður vent plátum saman og eisini hvør sær. Serliga vóru teir fastir fúsir á dansistøðunum Dallas og Klubbanum, sum seinni skifti eigara og navn til Club 20.

Meðan Regin, Jákup og Finn meir ella minni hava tikið seg aftur sum plátuvendarar fyri fleiri árum síðan, so vendir Heðin Arge framvegis plátum av og á. Hann hevur millum annað verið á Platform fyrr í ár.

### Dansistøðini ikki til at samanbera

Vit hava biðið Heðin Arge greiða frá náttarlívinum, tá teir fýra plátuvendarnir leygarkvøldið vóru millum teir mest umbidnu á teimum ymisku diskotekunum og dansistøðum fyri skjótt mongum árum síðan.

- Í Klubbanum vóru fast 500-600 fólk fríggja- og leygarkvøld, og tað var rættiliga nógv, tá havt verður í huga, at dansistøðini ikki sluppu at skeinkja. Vanligt var, at dansistøðini lótu aftur klokkan tvey fríggjakvøld og klokkan eitt leygarkvøld, og so varð vála í býnum.

Spurdur, um tað er stórur munur á dansistøðunum í dag og fyri góðum 20 árum síðan, svarar Heðin, at tekur ein eitt nú Platform, so kann staðið ikki sammetast við Club 20 ella Klubban.

– Í Platform er alt pent og nossligt og meira ekslusivt. Fólk eru væl ílatin, og tað merkist eisini, at promillan er ikki eins høg, sum hon ofta var í Klubbanum. Tað hevur eisini við sær, at tað ofta er verri at fáa lív í fólk á Platform. Kortini haldi eg staðið verða eitt útmerkað mótspæl til tað, ið æt Klubbin og Club 20, har tað mangan gekk hart fyri seg, greiðir Heðin Arge frá.

### Fyrsta tiltak av sínum slag

Javnan skipa dansistøð og diskotek kring landið fyri 70- og 80 ára kvøldum, har fólk, ið gingu í býnum tað tíðarskeiðið, fáa høvi hoyra gamal slagarar og minnast gamlar dagar. Sambært Heðini Arge, so er tiltakið hjá Platform leygarkvøldið fyrsta av sínum slag. – Tað hava verið sokallað 70 ára og 80 ára kvøld, men einki líknandi tiltak sum hetta hevur verið áður. Tað er stuttligt, at vit aftur eru samlaðir, og eg gleði meg, sigur Heðin Arge.

Spurdur, um hvørji løg, teir fara at leggja seg eftir at spæla leygarkvøldið, sigur Heðin, at tað er vónleyst at siga frammanundan, tí tað treytast, hvussu stemningurin verður. Hann vissar gestunum á Platform leygarkvøldi, at plátuvendarnir hava alt tað besta frá 70- og 80 árunum við sær i skjáttuni.



*Tað verður nostalgi fyri allar pengarnar á Platform leygarkvøldið. Jákup Magnussen, Regin Johansen, Finn Jensen og Heðin Arge, ið vóru millum okkara fremstu plátuvendarar í 70- og 80 árunum fara at venda plátum leygarkvøldið. – Tað er stuttligt, at vit aftur eru samlaðir, og eg gleði meg, sigur Heðin Arge*

*Mynd: Jens Kristian Vang*